

## Kunnu tosa danskt

Í Grønlandi fær uppskotið hjá Siumuts um, at tingmenn og landsstýrismenn skulu tosa grønlendskt á røðarapallinum í Landstinginum, ikki undirtøku. Landsstýrið hevur boðað frá, at tað tekur ikki undir við uppskotinum, og tað sama sigur hin andstøðuflokkurin, Atassut. Kuupik Kleist, landsstýrisformaður, segði í gjár, at tað eru fólk í Grønlandi - eisini grønlendingar, sum ikki tosa grønlendskt, og at uppgávan hjá myndugleikunum er at geva øllum somu møguleikar og karmar. Hann boðaði samstundis frá, at landsstýrið fer at koma við einum uppskoti um málpolitikk.

# Hamarsløgini gella aftur í Skálavík

**Tað er ikki gerandiskostur at hoyra hamarssløgini gella fyri nýbygdum húsum í Skálavík. Í hesum døgum eru menn tó í ferð við at byggja fleiri hús mitt í hugnaligu bygdini á eystursíðuni á Sandoynni. Talan er um summarhús**



BYGDAMENNING

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Skálavík:** - Vit eru beint nú í ferð við at seta sperrurnar upp í hesum summarhúsinum, sigur Johannes Kristensen av Sandi.

- Vit ætla, at tey verða innilokað í hesi vikuni!

Hann starvast sum handverkari og altmuligmand hjá fyritøkuni "Multitænastan" á Sandi, sum serliga hevur lagt seg eftir at gera smærri og størri arbeiðir á Sandoynni.

Teirra styrki er, at viðskiftafólkini verða tikin við upp á ráð, áðrenn eitt arbeiði verður sett í verk.

Kemur ein við eini tekning til eini hús, so verður henda gjøgnumgingin, onkur broyting verður kanska gjørd í tekningini, soleiðis at besta úrslitið fæst burturúr.

- So gera vit tað sum tey ynskja, og laga okkum eftir hvørjum øðrum, greiðir hann frá.

Hann og ein annar maður eru til arbeiðis í Skálavík beint nú. Her er talan um eitt øki sum er avsett til summarhús. Pláss er fyri seks húsum, og eru teir í løtuni í ferð við fjórða summarhúsið á økinum.

### 3-4 mánaðir aftrat

Johannes Kristensen arbeiðir hjá Multitænastuni, og sum navnið so greitt sigur, veitir fyritøkuna tænastu á mongum økjum.

Teir gera vanligt timburarbeiði, teir leggja flísar á hjá fólki, stoypa, grava, leggja kloakk, mála og tapetisera fyri kundar, men bert á Sandoynni.

Teir hava haraftrat átikið sær ymisk størri arbeiði. Í fjør smíðaðu teir eini hús fyri ein kunda heima á Sandi. Og nú eru teir so í ferð við eini onnur hús miðskeiðis í Skálavík - á tí tey nevna Oyravegnum.

Her er talan um eini hús sum Starvsmannafelagið letur byggja. Teir byrjaðu uppá arbeiðið fyri lítlum mánaði síðani, eftir at aðrir høvdu planerað grundøkið.

- Vit eru tveir mans til arbeiðis í dag. Og gongst soleiðis sum vit ætla, fer tað at taka einar 3-4 mánaðir aftrat, greiðir Johannes íðin frá.

Multitænastan skal somuleiðis mála og tapetisera innan. So tá teir eru lidnir við sítt arbeiði, kann felagið fáa handaðan lykilin til hesi snotuligu húsini.

- Vit hava eitt sindur at gera, men tað er kortini so mikið at vit klára okkum!

### Barnavinarligt umhvørvi

Tá Sosialurin vitjaði í Skálavík týsdagin vóru Johannes og ein annar maður í holt við at seta sperrurnar upp.

Her er sum nevnt talan um eini summarhús hjá Starvsmannafelagnum, og húsini eru tí innrættað á bestan hátt til at røkka hesum endamáli.

> *Ein skal duga mangt og hvat, tá ein arbeiðir hjá Multitænastuni*

Húsini eru í tveimum hæddum. Í niðaru hæddini verða køkur og stova í einum, trý kømur, fýrrúm og gangur.

Men í ovaru hæddini verður ein hemsur, ið kann nýtast til ymisk endamál, alt eftir hvat tørvurin nú einaferð verður.

- Hesin hemsurin verður helst eitt fínt stað hjá børnum at spæla inni í, sigur hann brosandi.

Hinvegin liggur hetta summarhúsið sera væl fyri í landslagnum: Tað liggur nakað burtur frá vegnum, men er kortini niðri í sjálvari bygdini, í nánd av øðrum summarhúsum.

Er veðrið til vildar, ber væl til hjá børnunum at spæla sær í ánni sum rennur beint framvið. Ella tey fara niðan á fótbóltsvøllin við bygdarskúlan, ið bert liggur eitt lítið hanagleiv frá summarhúsinum.

Eitt ynski frá felagnum var, at øll skuldu kunna nýta húsini, óansæð likamligan førleika.

- Vit fara tí at gera eina rampu, soleiðis at fólk, sum eru illa gongd, eisini kunnu gera brúk av teimum, sigur Johannes Kristensen.

## Ein multi-maður

- Ein skal duga mangt og hvat, tá ein arbeiðir hjá Multitænastuni, sigur Johannes Kristiansen við einum brosi.

Sjálvur er hann útbúgvin sum - halt tær nú fast - landbúnaðarmaskinmekanikari, sum tað eitur á hampiliga góðum føroyskum máli. Ella í stuttari útgávu: traktormekanikari.

Hann kom til Føroyar í síni tíð sum húskallur hjá einum bónda heima á Sandi. Hetta var í 1994, og arbeiddi hann fyrst eitt ár í fjósinum. Síðani hevur hann m.a. arbeitt í smiðjuni hjá Statoil og hjá J&K Petersen, har hann sigldi við flakanum "Borarin" í tvey ár.

- Eg kom tá suður aftur til Sands, og byrjaði hjá Multitænastuni, greiðir Johannes Kristiansen frá.

- So tú skilir, at eg havi prøvað eitt sindur av hvørjum!